## Fleiri tvingsilssølur

Í seinastuni hava danskir búskaparfrøðingar ávarað um, at umstøðurnar hjá teimum, sum eiga hús ella íbúð, eru ikki so tryggar, sum teir hava verið. Nú gongur sjón fyri søgn, tí sambært hagstovuni í Keypmannahavn er talið á tvingsilssølum vaksið heili 33 prosent tann seinasta mánaðin. Í apríl vóru 114 hús og íbúðir lýst til tvingsilssølu ímóti 86 í mars. Bankarnir halda ikki, at talið er ørkymlandi, men at tað gevur eina mynd av støðuni.



## Edmund sleppur ikki

Sum tingmaður fyri Sambandsflokkin skal Edmund Joensen, løgtingsformaður, halda regluna um, at samgongumenn leggja einki uppskot fyri Løgtingið, uttan at samgongan er samd um innihaldið. Tað sigur Kaj Leo Johannesen, floksformaður, eftir at Edmund Joensen hevur boðað frá, at hann fer at koma við uppskoti um at skipa Føroyar sum eitt valdømi. Við Útvarpið sigur floksformaðurin, at samgongan er ikki samd um uppskotið.

Rás 2 byggir út:

# Fer at senda sjónvarp í heyst



*Jan Petursson Jacobsen, nýggi stjórin á Rás 2. Gongur sum hann ætlar, byrjar rásin at senda sjónvarp í heyst*

**Gongst sum ætlað fær SvF sín fyrsta føroyska kappingarneyta í heyst, tá Rás 2 ætlandi fer undir at senda sjónvarp**

LOFTMIÐLAR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað hevur ligið í luftini eina tíð, og nú gerst tað so veruleiki: Sjónvarp Føroya fær føroyska kapping.

Rás 2 fer fyrsta dagin undir at seta sendistøð upp á Nólsoynni. Í vikuni vórðu serligar gravimaskinur fluttar til Nólsoyar, sum skulu grava ein kaðal frá bøgarðunum niðan á Eyggjaklett, sum er hægsta punktið á oynni.

Talan verður ikki um nakra lætta uppgávu, tí í støðum er mest sum steyrrætt upp um hamrar, og gravast skal gjøgnum grót og skursl. Og júst tí er neyðugt við serligum gravimaskinum.

- Vit fara í størst møguligan mun at gera arbeiðið sjálvir. Sjálvandi er ymiskt, sum vit náttúrliga ikki kunnu gera, eitt nú sjálva mastrina, men alt tað, vit sjálvir kunnu gera, gera vit, sigur Jan P. Jacobsen, sum hevur tikið við stjórastarvinum á Rás 2 eftir pápanum og stovnaranum Peturi Jacobsen.

Tað verður heldur ikki løtuverkj at fáa lagt kaðalin undir jørð, tí talan er um gott tveir kiloimetrar langan kaðal. Men gongst sum tíðarætlanin sigur, fer hetta arbeiðið at taka áleið tveir mánaðir.

### Dýr men varandi loysn

Uppi á Eyggjakletti verður sjálvandi eisini neyugt at húsa teirri útgerð sum skal til, fyri at sendarar og móttakarar skulu virka. So umframt sjálva mastrina, sum verður 30 metrar høg, og skal halda sendarum og móttakarum, verður eisini eitt 50 fermetrar stórt hús bygt.

Av tí at talan er um streymkaðalar verður kravt, at økið verður hegnað inni, hóast seyðamenninir fegnir vildu at so ikki verður. Staðið er sum vera man ógvuliga ábært, og tí høvdu seyðamenninir væl kunna hugsað sær at nýtt húsið at kroka aftanfyri, skuldi eitt æl komið á teir uppi á Høgoyggj.

Tað sigur seg sjálvt, at hetta, at leggja ein so langan kaðal og at byggja hús og seta mastur upp, gerst ikki fyri einki.

- Hetta er ein rættiliga dýr, men samstundis eisini ein varandi loysn. Tað fer at kosta okkum út við tríggjar milliónir, men tá skulu vit eisini minnast til, at staðið liggur strategiskt ógvuliga væl fyri. Við hesum sendara fara vit at røkka meiri enn 50% av føroysku húsarhaldunum, sigur Jan P. Jacobsen, stjóri.

### Eru til reiðar

Og rætt er tað. Av Eyggjakletti røkkast Skálafjørðurin, stórur partur av Sundalagnum, alt miðstaðarøkið umframt Skopun og Skálavík á Sandoynni.

So útbreiðslan verður framúr góð við bara einum sendara, men tað er eisini neyðugt, tí ætlanin er við tíðini at taka upp kapping við Sjónvarp Føroya. Rás 2 hevur longu útgerðina til upptøku og sending umframt studio.

- Fyrireikingar eru longu farnar í gongd. Vit taka longu nú upp tilfar at senda, tá alt tað tekniska er klárt. Eingin endaligur strukturur er enn lagdur enn, fyrst skulu vit hava alt upp at standa, og síðani fara vit at royndarsenda í eina tíð, sigur Jan P. Jacobsen, stjóri á Rás 2.

Tað er nú meiri enn hálvtannað ár síðani fyrstu fyrireikingarnar byrjaðu, og arbeitt hevur verið miðvíst líka síðani. Nú er tað so komið hartil, at nakað ítøkiligt fer at henda, og gongur sum Jan P. Jacobsen ætlar, verða fyrstu sjónvarpsmyndirnar frá Rás 2 at síggja einaferð í heyst.

Eirikur Hansen, stjóri á Frost:

# Fingu nógv burtur úr á NAFF

**Tað er sjáldan tú selur nakað beinleiðis á einari slíkari messu, men áhugin frá kundum var stórur. Og reint faktisk seldu vit tvey smærrri frystirúm, sigur Eirikur Hansen**

NAFF
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Eirikur Hansen, sum er annar av stjórunum og eigarunum av Frost, er ógvuliga væl nøgdur við tað, sum kom burtur úr á NAFF*
*Mynd: Leo Poulsen*

Stjórarnir báðir á Frost, Ólavur Durhuus og Eirikur Sundar Hansen, vóru meiri spentir enn vanligt til eina sølustevnu, nú North Atlantic Fish Fair var hildið í síðstu viku. Og orsøkin var greið, tí teir eru fyri tíð síðani farnir í eitt samstarv við íslendska fyritøku – av sama navni – sum gevur teimum nógv størri møguleikar.

Íslendingar eru – eins og samstarvsfelagarnir í Føroyum - sjálvandi serfrøðingar innan økið, sum í hesum føri er køli- og frystiútgerð. Við íslendska samstarvinum kann Frost nú bjóða fram størri køli- og frystiskipanir til eitt nú flakavirkir og skip.

Samstarvið er fingið í lag við at íslendingar hava keypt seg inn í føroysku fyritøkuna, og teir eiga nú 33% av Frost í Føroyum.

Teir báðir Ólavur og Eirikur síggja stórar møguleikar í samstarvinum at menna fyritøkuna og eru heldur ikki í iva um, at nýggja útboðið fer at vaksa um virksemið. Og týðiligar ábendingar um júst hetta fingu teir á NAFF.

- Eg haldi, at tað kom heilt væl burtur úr. Vit fingu hópin av fyrispurningum, eisini frá áhugaðum potentielt ógvuliga spennandi kundum, sigur Eirikur Hansen.

### Úr at gera

Frost hevur longu sum er úr at gera, og veksur virksemið, soleiðis sum alt í løtuni bendir á, so verður neyðugt at økja um starvsfólkatalið. Og tað er ikki bara sum at siga tað, tí hetta er serligt fakøki, sum avgjørt ikki er »yvirfólkað«. Men tað er ein positivur trupulleiki.

- Eftirvirkningarnir hava verið nógvir. Vit hava havt eina rúgvu av fyrispurningum alla hesa vikuna, sigur Eirikur Hansen.

Stjórin í Frost sigur, at tað hjá teimum ikki er vanligt, at nakað verður selt beinleiðis á einari slíkari messu, men tað hendi reint faktisk á NAFF. Teir stillaðu út eitt frystirúm upp á 8 kubikkmetur, sum er munandi størri enn tey, teir áður umboðaðu, og teir seldu tvey av hesum á sjálvari messuni.

So samanum tikið eru stjórarnir í Frost sera væl nøgdir við úrslitið av NAFF, sum altso hevur ført til hópin av fyrispurningum og eisini meiri ítøkiligum áheitanum.